# TILTØK

**Hebron, Argir**
Nýggjársveitsla fyri vaksin verður leygardagin kl. 19.00.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Á møtinum luttaka Monika og Tim Sharp. Eingin sunnudagsskúli verður.
Nýggjársveitsla fyri børn verður kl. 15.00.
www.hebron.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið verður skipað fyri stuðulstiltaki fyri offrunum frá flóðalduni í Asia.
Kl. 20 luttaka millum annað Maria Andersen, Magni Christiansen og Heini Lutzen. Ein steðgur verður uml. kl. 22.00 og kl. 22.30 verður hildið fram til Sigrid Rasmussen, Pætur Larsen, dramabólki o.ø.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti og kl. 12 tilbiðjanarmøti. Klaksvíkingar vitja við sangi og talu. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Drekkamunnur verður millum møtini. Sunnudagsskúlin er kl. 12.
Innsavningin fer óskerd til offrini frá flóðalduni í Asia.
www.livdin.fo

**KFUK í Havn**
Eldrasamkoma verður mánadagin 10. jan. kl. 15.00 við Helenu og Hanusi Samuelsen.

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Marna Nattestad.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ kvinnunum.
Mánakvøldið kl. 20 felags bønarmøti í Oasuni.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Einki møti hóskvøldið.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni og Møti kl. 18 í Missiónshúsinum v/ Martin Thomsen.

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
kemur saman á Sjómansheiminum mánadagin kl. 19.30.

**Meinigheitshúsið**
Hósdagin kl. 16-17 venur Gentukórið, kl. 20 Heimsbønarløta.
Fríggjadagin kl. 19.30-21.30 Juniorhugni, kl. 20 Heimsbønarløta.
Leygardagin kl. 20 Heimsbønarløta.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli – bússurnar verða innsavnaðar, kl. 18 Heimsbønarvikan endar: Møti v/ Tom Skaale, Fríða syngur.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Fríggjadagin kl. 17 skipar Heimaforbundið fyri jóla/nýggjársveitslu fyri vaksin. Øll eru vælkomin. Hjálpararbeiðið, sí: www.salvos.com/torshavn

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdagin 6. januar kl. 20 Taizé-kvøld (bønarstund v/ Sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciscanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Lars Messerschmidt, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.00.

**Frá Ebenezer**
Hósdagin kl. 10 Fyrrapartsløta fyri eldri menn í Sloans húsi, kl. 17 Sangvenjing – eldra barnakórið, kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti: Brøður úr Betesda vitja.
Mánadagin kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í morgin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Rúna Rasmussen, evnið er »Nýtt ár – nýggir møguleikar«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Missiónsmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli, innsavnan til neyðhjálp í Asia, kl. 18 Møti við sangi og vitnisburði.
Mánadagin kl. 20 Felags bønarmøti í Oasuni.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli við Marjon Poulsen, barnaráðgeva, onki møti vegna missiónsviku í Kvívík.
Missiónsvikan í Vestmanna byrjar týsdagin 11. januar kl. 20.00.

**Missiónsvika í Skálafirði 5.-9. januar 2005**
Hósdagin kl. 20 talar Regin Høgnesen.
Fríggjadagin kl. 20 talar Sylverius Jacobsen, Thomas Dam og Petur Hans Hansen spæla og syngja.
Leygardagin kl. 20 Ámundur Berthelsen talar, Martha og Julia syngja.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Niels Jacob Nielsen talar og Hannis syngur. Innsavnan til Heimamissiónina.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 AWAKE, við ungdómum.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj, barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Thabor, Fuglafjørður**
Bønarmøti verður hvørt kvøld kl. 19.30, tó verður einki 6. januar, trettandakvøld.

**Frá Elim í Søldarfirði**
Á møtinum mikukvøldið kl. 20 greiðir Dan Jacobsen frá trúboðaravirkseminum í Mongolia. Eisini luttekur Magni Jacobsen úr Klaksvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Karmel á Eiði**
Møti verður sunnukvøldið kl. 19 við Sigurd Sørensen.

**Samkoman Lívsins Orð Saltangará**
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánadagin kl. 20 Ungdómshúsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 19 Jólafestin fyri vaksin.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, sunnudagsskúlakortini verða innheintaði, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti við André Matras og Irdi og Kára Múller Jacobsen. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Tummas J. Askham og Olvheðin Jakobsen. Kristoffur, Theodor og John Kári syngja.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Ólavur Jóhannesen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Frelsunarherurin í Vági**
Sunnudagin kl. 18 Møti, Nimrod og Ebba syngja. Nimrod Midjord talar.
Øll eru vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Leygarkvøldið 8. januar kl. 20.30 verður hugnakvøld v/ Sigrið og Jóannis Fonsdal.
Sunnudagin kl. 15 verður Gudstænasta í Háteigskirkju, har Jóannis Fonsdal prædikar. Aftaná verður kaffi í Ørkini.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 3. januar*
kl. 10-14 Opið hús
kl. 14-17 Kortspæl, telving og onnur spøl.
kl. 14-17 Havnaprát, Birgar Fridtleif Johannesen.
*Týsdagin 4. januar*
kl. 10.00–15: Sangur. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Vakurleikaserfrøðingur Elsa í Garði
*Mikudagin 5. januar*
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilm. tlf. 316491
kl. 17-21 Opið hús
*Hósdagin 6. januar*
kl. 10.00–10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 7. januar*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou, Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólíkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin. Vit byrja eftir jólafrítíðina *mikudagin 5. januar.*
Vit hittast í teimum nýggju hølunum, har vit práta, hugna okkum og hyggja okkum um.

**Dagtilhaldið Fløvi**
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Mánadagin 3. januar*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
*Týsdagin 4. januar*
Boccia
*Mikudagin 5. januar*
Vit gera klárt til nýggjársfestina
*Hósdagin 6. januar*
Kl. 17 Nýggjársfest. Jona Henriksen fortelur søgu, og Jóhan Mortensen luttekur við harmoniku og sangi. eisini verður spurnarkapping v/ Egil G. Olsen.
*Fríggjadagin 7. janaur*
Opið Hús

*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Eliaskirkjan**
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærararaíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 á Glyvrum. Í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

## 90 ár
10. januar verður Anna Petersen (Anna hjá John) Vágur, 90 ár. Vælkomst verður leygardagin 8. januar í Stóra Pakkhúsi frá kl. 10.00-16.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## 80 ár
8. januar verður Herborg Jacobsen, Argir, 80 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá hana hendan dagin, eru hjartaliga vælkomin kl. 16.00-19.00 í heiminum hjá Dinnu Poulsen, Garðsgøta 23 á Argjum.

## Brúdleyp
Leygardagin 8. januar giftast Sóley Einarsson, Lamba og Jóhan á Lava Sundskarð, Klaksvík. Opið hús verður kl. 17 hjá Sóley og Jóhan, Byrgisheyggur 15, Lamba. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygarmorgunin hin 22. januar kl. 11.00 giftast í Kelduni í Skálafirði, Tórfríð Arnfríðardóttir Jacobsen, úr Skálafirði og Dan Danielsen, av Strondum. Opið hús verður í Bygdarhúsinum á Strondum kl. 19.00 við grýturætti, køldum borði og køkum. Tey, ið vilja gleða brúðarparið á teirra stóra degi, kunnu tekna seg á tlf. 442071, 250727, 448039 ella 748039 áðrenn 14. januar.

Leygardagin 26. februar kl. 10.00 giftast í Rituvíkar kirkju Hanna Olsen, Rituvík og Ásmundur Hansen, Søldarfjørður. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 16.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, verða biðin um at ringja á tlf. 442036, 254250, 504970 ella 441396, 447774. Øll eru hjartaliga vælkomin.